*Barnabati:*

# Fjølbroytt hjálpararbeiði

**Alheimsfelagsskapurin Save the Children Allience varð stovnaður aftan á seinna heimsbardaga. Tað vóru m.a. Canada, Ongland, Noreg og Danmark, sum vóru tey fyrstu. Seinni eru so mong lond komin við.**



KOSTUR, IÐ GAGNAR

ETIÐ GROVT · ETIÐ FJØLBROYTT · ETIÐ IKKI OV NÓGV
MINKIÐ UM SUKUR OG FEITT

Útgevari: Barnabati Prent: Estra Gøtu Tekning: Ingi Joensen

Barnabati í Føroyum bleiv stovnað 22. mars 1980 eftir áheitan frá danska »Red Barnet«. Lokaldeildir hava verið kring landið. Barnabati hevur nú eitt landsfelag, har øll kunnu gerast limir.

Vit hava tosað við Vibeke Ingvarsson í Norðskála, sum er kassameistari í felagnum, og spurt hana eitt sindur um arbeiðið hjá Barnabata.

**STUÐLA**

Barnabati hevur hesi árini, felagið hevur virkað, stuðlað mongum ymiskum tiltøkum, børnum og ungdómi at bata.

Einkjugrunnur Føroya fekk í fjør 50.000 kr., í ár hevur grunnurin fingið 25.000 kr.

Vit kenna jólakalendaran hjá Barnabata. Ágóðin av hesi søluni er farin til skótaarbeiði. Inntøkan av kalendaranum 1985 var góðar 41.000 kr.

Gentuskótar hava selt Barnabata-merki, sum tær so hava fingið ágóðan av. Altjóða barnalegur vórðu í ár við merkjasølu stuðlaðar við uml. 15.000 kr.

Barnabati hevur eisini stuðlað Ungtemplarasambandinum.

**PROJEKT Í INDONESIA**

Barnabati hevur stuðlað projekti í Indonesia við 125.000 kr. ígjøgnum fimm ár. Tiltakið hevði til endamáls at berjast ímóti spitalsku sjúnuni. Danmark stóð fyri hesum arbeiði.

**HJÁLPARARBEIÐI Í MEXICO**

Formaðurin í Barnabata, Niels Petersen í Hvalvík, er í løtuni í Sunore í norður Mexico. Barnabati í Føroyum fekk áheitan frá mexikanska barnabata um at stuðla einum tiltaki, teir ætla at koyra í fimm ár. Tiltakið fevnir um børn frá 0 til 5 ár. Tey verða máld og vigað, mammurnar fáa vegleiðing um m.a. sunnan kost og heilsurøkt. Hetta tiltak byrjaði í fjør. Barnabati hevur higartil latið 5.000 dollarar til endamálið.

Barnabati hevði herfyri eina giroinnsavning, sum gav uml. 12.000 kr. Hesir pengar verða latnir til hjálp aftaná jarðskjálvtan, sum var í Mexico síðsta ár.

Tá Niels Petersen kemur aftur úr Mexico fer hann at halda fyrilestrar og vísa myndir frá tiltakinum, Barnabati stuðlar í Sunore í norður Mexico.

**LOPPUMARKNAÐUR**

Fyri stuttum skipaði Barnabati fyri loppumarknaðum kring landið. Hetta gav uml. 45.000 kr. Vibeke Ingvarsson sigur, at fólk vístu hesum tiltaki stóra vælvild og áhuga. Barnabati takkar fyri undirtøkuna. Hetta var annars fyrstu ferð, at skipað er fyri loppumarknaði kring landið. Barnabati hevur áður havt loppumarknað á Oyrarbakka.

Vibeke sigur, at fólk ofta spyrja, hvat tey gera við klæðini, ið ikki verða keypt. Tey verða ikki koyrd burtur. Barnabati spurdi seg fyri á Kofoed skúlanum í Danmark, um tey vildu hava klæði og tað vildu tey fegin, og avlopið er sent avstað.

**SELJA PLAKATIR**

Barnabati hevur gjørt nógv við at prenta plakatir. Júst í hesum døgum hava tey sent eina út til stovnar, skúlar, sjúkrahús v.m. Plakatin eitur »Kostur, ið gagnar«. Barnabati vil á henda hátt vísa á, hvussu stóran týdning tað hevur at hava góðar kostvanar.

Jólamerkjagrunnurin hevur stuðlað útgávuni við 15.000 krónum og plakatin er prentað í 5.000 eintøkum. Hon fæst til keyps í Skótabúðini og kostar 20,- kr.

**LISTAFÓLK TEKNAÐ**

Barnabati hevur annars gjørt nógv við at geva plakatir út og selt. Vit hava sæð vakrar plakatir, sum William Heinesen, Zacharias Heinesen, Ingálvur av Reyni og Tove Guttesen hava teknað.

**KUNNU SØKJA UM STUÐUL**

Vibeke Ingvarsson sigur, at feløg kunnu søkja Barnabata um stuðul til eitthvørt mennandi endamál fyri børn og ung.

Barnabati hevur eisini áhuga fyri at stuðla barnaansingarstovnum. M.a. er peningur settur av til barnagarðin, ið verður í Vági.

**IKKI BARA INNSAVNING**

Barnabati roynir eisini at fáa pening aðrar vegir enn við innsavning. M.a. hevur Føroya landsstýri stuðlað ferðini hjá Niels Petersen til Mexico.

**LANDSFELAGIÐ**

Í nevndini fyri landsfelagið sita Niels Petersen, formaður, Hvalvík, Vibeke Ingvarsson, Norðskáli, Gu[illegible]n Kristiansen, Vági, Marna Olsen, Vági, og Jógvan Bæk, Havn.

Fólk kunnu tekna seg sum lim hjá einum av nevndarlimunum ella nýta girokontoina hjá Barnabata, 202. Limagjaldið er 60 kr. og kann gjaldast í øllum bankum og sparikøssum í landinum.